# Menn forvinna tað tvífalda

Eitt yvirlit yvir inntøkuna hjá kvinnum og monnum í Føroya Arbeiðarafelag vísir, at mennirnir forvinna munandi meir enn kvinnurnar. Higartil í ár er inntøkan hjá monnunum at kalla tvífalt so høg sum hjá kvinnunum, vísir ein lønaruppgerð. Nakað skyldast sjálvandi, at tað eru kvinnur, ið arbeiða niðursetta tíð, men hetta er kortini ikki so nógvar, at talið átti at verið helvtina minnið. Í Føroyum vantar ein verulig lønarkanning, ið kann staðfesta, hvussu stórur munur er á lønum, hví munur er, og hvørji tiltøk kunna gerast fyri at burturbeina lønarmunin. Sum er finnst bert avmarkað hagtalstilfar, sum kann geva ymiskar ábendingar, men ikki verulig svør.



# Hvør føroysk fyritøka rennur skjótast?



*Leif Beck Fallesen, blaðstjóri og forstjóri á dagblaðnum Børsen vinstrumegin, her saman við Kenneth Plummer, aðalstjóra á Danmarks Radio og aðalstjóranum í TV2, Per Mikael Jensen. Hósdagin í næstu viku verður hann at hoyra í EIk Banka í sambandi við áhugaverda vinnufundin, sum Business-line.fo skipar fyri*

*Mynd: Carsten Lauridsen/ Polfoto*

**Hósdagin 1. november klokkan 16 skipar Business-line saman við Børsen fyri einum vinnufundi, har ljós verður varpað á vinnarafyritøkur. T.e. feløg í Føroyum, sum vaksa skjótast**

VINNA

Tað er www.business-line.fo saman við kenda danska tíðarritinum Børsen, sum skipar fyri einum vinnufundi í Eik Banka, har ljós verður varpað á tær sokallaðu gazellufyritøkurnar. Gazellur eru fyritøkur, ið hava megnað at skapt ein serliga skjótan vøkstur seinastu 4 árini.

Tann mest grundleggjandi treytin fyri at verða Gazella er, at bruttovinningurin skal verða tvífaldaður seinastu fýra árini, samstundis sum onki av ársins úrslitum áðrenn skatt skal hava hall.

Í okkara grannalondum verður nógv gjørt burturúr hesum vakstrarfyritøkum, og í Danmark er tað dagblaðið Børsen, saman við Jyske Bank, ið skipa fyri vinnuráðstevnum, har vinnarafyritøkurnar verða funnar og heiðraðar.

Business-Line hevur fingið í lag samstarv við Børsen um at skipa fyri einum vinnufundi í Eik Banka, har føroysku vinnarafyritøkurnar verða funnar og heiðraðar.

Høvuðsnavnið á vinnufundinum er ongin minni enn Leif Beck Fallesen, ið bæði er leiðandi blaðstjóri og fyritøkustjóri á danska dagblaðnum BØRSEN.

Á fundinum verða eisini umboð fyri Børsen Executice Club, ið fer at greiða frá, hvat hesin leiðarafelagsskapur hjá Børsen kann bjóða føroyskum vinnulívi.

Vinnufundurin verður í Eik Banka hósdagin tann 1. november kl. 16 – 18.

Freistin fyri tilmelding er fríggjadagin 26. oktober 2007 kl. 16, tí er neyðugt við skjótari tilmelding, um tú vilt tryggja tær pláss á hesum áhugaverda tiltaki í EIK BANKA, ið er ókeypis.

## Skráin fyri vinnufundin verður henda:

| | |
|---|---|
| 16:00 | Skráseting og kaffi |
| 16:30 | Eik Banki bjóðar vælkomin |
| 16:40 | Business-Line: Hví skulu vakstrarfyritøkurnar fram í ljósið? |
| 16:50 | Føroyskur vinnulívsleiðari: Hvønn týdning hevur vøkstur í okkara fyritøku? |
| 17:00 | Leif Beck Fallesen, stjóri í Børsen: " De globale vækstskabere" |
| 17:25 | Ársins vakstrarfyritøka (gazella) 2007 verður kunngjørd og heiðurtekin handað |
| 17:35 | Diana Willemoes, vice president Børsen Executive Club: Historien om BEC og oprettelse af regionale afdelinger. Er Færøerne en mulighed? |
| 18:00 | Liðugt |

